

# Viðraði illa í Grønlandi

26 november: Í dag er kavarok og væl av vindi. Polar Natarnaq kom inn í morgun at landa og skifta skipara. Har var um at vera fult hjá teimum. Lómur hevur verið inni í Illulisat og landað gott 120 tons eftir 3 samdøgur. Teir hava roynt vestur úr Diskooynni uppi við Haruoynna. Tað er ein lítil oyggj sum eitur so, men har eru ongar harur, sjálvt um navni sigur so. Tíðindi úr Suðurgrønlandi. Her er nógv tosað um, at teir rokast í toski. Trolarin Sisimiut fekk 135 tons av toski í tvey samdøgur í Julianiehaabsbuktini herfyri. Føroyingar eru umborð á onkrum av teimun smáu trolarunum. Tá veðrið er til vildar vignast væl við fiskiskapinum. Fiskurin er tó smáur hjá teimun. Við línubátum, har føroyingar eru við, er slagið betri. Tveyarar og trýarar er støddin. Ein av bátunum hevði sett 30.000 húkar og fekk 32.000 pund. men veðrið er bedrøviligt verður sagt.

*Grønlandstíðindi frá Kára við Stein*



*Geir Dahle, Arne Poulsen og Bjarni Djurholm til móttøkuna hjá Fiskaaling seinasta hósdag*



*Starvsstovan er up-to-date og fult á hædd við aðrar líknandi starvsstovur í londunum uttan um okkum*

eru altíð knýttar at einum universiteti. Tað er í hesum sambandi, at Petra Hansen er sett í starv, og arbeitt verður við at fáa verkætlanina knýtta at Stirling Universiteti í Skotlandi. Samstundis er verkætlanin broytt frá einari trý ára ætlan til eina fýra ára verkætlan.

Hannes Gislason kundi annars ynskt sær, at vaksið bleiv um granskarahópin við fleiri PhD-lesandi og upp á sikt at útbyggja starvsstovuna við fleiri tólum.

- Tað er ynskiligt at betra um granskingarumhvørvið, sum krevur stimulatión. Vit høvdu vónað, at granskingarparkin bleiv veruleiki, men so varð ikki á hesum sinni. Við Áir er kanska ikki mest spennandi granskingarumhvørvi, men tað er at vóna, at vit fáa fleiri granskarar, sigur Hannes Gislason.

Men hann ásannar, at við verandi fígging steðgar vaksturin skjótt. Men hann vísir sjálvur á, at tað finnast aðrir møguleikar at koma fram at fígging, nevniliga við at koma við í altjóða gransking og fígging.

Teir arbeiða eisini við eitt nú gransking av góðsku av alifiski og endamálið er at stuðla verandi alivinnu og at stuðla undir menning av nýggjari alivinnu.

- Vit ætla okkum at royna at vaksa, men tað er sjálvandi avmarkað, hvussu skjótt vit kunnu vaksa. Sum er eru tað teir menniskjaligu resursirnir, sum avmarka møguleikarnar, sigur Hannes Gislason, granskingarleiðari á Fiskaaling við Áir.

# Føroyar vælegnaðar til toskaaling

**Tað metti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tá hann helt røðu á móttøkuni, sum Fiskaaling skipari fyri í sambandi við nýggja starvsstovu**

GRANSKING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo" leo@sosialurin.fo*

Fiskaaling varð stovnað í 1970, og Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin í felagnum. Fyrstu uppgávurnar hjá felagnum vóru at menna framleiðslumannagongdir og at kanna, hvørjir møguleikar vóru fyri lønandi aling í Føroyum.

Tíðliga í áttatiárunum, tá ið verulig gongd kom á framleiðsluna hjá privatum alarum, varð uppgávan hjá felagnum at fáa til vega nokk av dygdargóðum alitilfari sum rogn, yngul og smolt, og at geva alarum innlit í tann kunnleika, sum var uppbygdur í felagnum.

- Kynbótaarbeiði og sjúkuverja av alilaksi vórðu mettar sum týdningarmesta uppgávan, og hevur kynbóta- og miðvísa heilsuarbeiðið eydnast væl, segði Bjarni Djurholm.

Fyri at fjøltátta føroyska aling fór Fiskaaling í 1998 undir miðvísar royndir at ala kalva. Støð er bygd í Nesvík, har møguleikar eru at gera royndir við aling av marinum fiskasløgum.

Í 2000 tók nevndin støðuna hjá Fiskaaling upp til nýggja viðgerð, og varð tikin avgerð um, at Fiskaaling skal at ganga á odda í granskingar- og menningarvirksemi innan alivinnuna í Føroyum.

- Í 2004 varð avgjørt, at steðga við kynbótaarbeiðinum við laksi, tí laksarogn, ið eru ein standardvøra, nú kunnu flytast inn, og raksturin er ikki lønandi. Til tess at fáa sett ferð á granskingina varð síðst í 2005 settur ein granskingarleiðari við granskarútbúgving (PhD), umframt at fleiri aðrir granskarar eru knýttir at felagnum, segði Bjarni Djurholm.

Í 2006 byrjaði Fiskaaling eina toskaverkætlan. Í grannalondunum hava tey í fleiri ár gjørt royndir við toskaaling og útlit eru nú fyri lønsemi í hesu framleiðslu.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, helt røðu, tá Fiskaaling hevði móttøku seinasta hósdag*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Altjóða granskingarumhvørvi

Mett verður, at støðuga hitalagið í sjónum kring Føroyar, ger oyggjarnar vælegnaðar til toskaaling. Haraftrat verður mett, at toskur av Føroya Banka, ið er kendur fyri sínar góðu vakstrareginleikar og góðu eginleikar annars, er væl egnaður sum alifiskur.

- Fyri at stuðla vinnuni at koma skótt og effektivt í gongd við toskaaling, varð avgjørt at fara undir eina verkætlan yvir trý ár innan framleiðslu av toskayngli, segði Bjarni Djurholm.

Felagið hevur góðar umstøður til royndarvirksemi. Á Lívfiskastøðini í Skopun og á Sjódeplinum í Nesvík kunnu royndir gerast við marinum fiskasløgum, og við Áir kunnu royndir gerast við fiski í vatni. Harumframt hevur felagið starvsfólk, ið hava drúgvar royndir at halda fisk.

- Visjón Fiskaalings er at skapa eitt altjóða granskingarumhvørvi, sum við gransking og menning víðkar vitanarstøðið, við tí endamáli at økja um dygdina í alingini, segði Bjarni Djurholm.

Felagið leggur stóran dent á sltjóða granskingarsamstarv við granskingarstovnar og vinnulív, og ætlar felagið at prioritera hesi øki:

- Gransking og royndir við aling av fiska- og djórasløgum
- Gen- og biotøkni
- Fóður, vatn og framleiðsluhættir
- Granska og menna betri matvørugóðsku úr aldum fiski
- Gransking og menning innan fiskaheilsu og aliumhvørvi
- Rognaframleiðslu og onnur framleiðsla

- Í heila tikið hóska ætlanir felagsins væl saman við ætlanum landsstýrisins at menna gransking og at byggja granskarapark, eins og felagið kann gerast ein uppaftur týdningarmiklari aktørur, tá tað snýr seg um at menna føroyska alivinnu og framleiðslu burtur úr alifiski, segði Bjarni Djurholm, og endaði við hesum orðum:

- Vit vilja tí vóna, at felagið framhaldandi kann menna seg sum týðandi granskingardepil á sínum øki, og ynskja vit teimum góða eydnu við arbeiði teirra.